

*Bogi Hansen er ótrúligur, honum kunnu vit øll vera stolt av, helt Poul Mohr fyri, tá hann í einari pausu fekk sær eitt prát við Kjartan Hoydal, leiðara fyri ráðstevnuna. Poul Mohr helt, at vinnan var við at broyta hugburð til umhvørvisspurningin, og hendan ráðstevnan var eitt gott prógv fyri tí.*
*Kjartan Hoydal fegnaðist um samnrenningina av vinnu og gransking, og fyrilesturin hjá Boga Hansen og móttøkan av honum vísir, at til ber at samstarva og samskifta um hetta evni*

*Mynd: Helgi Jacobsen*



*Jørgen Sten, blaðmaður á danska blaðnum, Information, spurdi Helenu Dam á Neystabø, um tað ikki hevði verið skilabest at stegða allari leitan eftir olju. Tí um vit veruliga finna olju, fer føroyska CO2 útláti at froysa upp eftir. Men føroysak landsstýriskvinnan við ábyrgd fyri umhvørvinum helt ikki hetta vera eina møguliga leið.*
*- Men kanska finna vit ikki olju fyrr enn verðin ikki longur vil hava hana, segði hon skemtiliga*

*Mynd: Helgi Jacobsen*



*Døgurðastegðurin var nýttur til góðan mat og gevandi prát. Tað er ikki á hvørjum degi at so nógvir politikarar, so nógv vinnulívsfólk og so nógvir granskarar og serfrøðingar eru samlaðir undir sama taki*

*Mynd: Ólavur Frederiksen*




